Jákup góður við 4. a

Á triðja ári hevur 4. a í Eysturskúlanum havt sín egna politist, sum vitjar flokkin, og tey kunnu altíð venda sær til hansara

Teir 19 næmingarnir í 4. a í Eysturskúlanum hava gott at bera politinum, og tey hava ein serligan tokka til politistin Jákup Alberg Berg.

Hann er teirra maður.

Tey, sum nú ganga í 4. a, gingu í 1993 í 2. flokki, og tey sluppu sum einasti skúlaflokkur í Føroyum í eina royndarskipan við "Floksins politisti".

Skipanin er eitt samstarv millum lærarar, næmingar og politistin.

Jákup Alberg Berg vitjar ikki bara flokkin fyri at tosa um ferðslu og onnur tílík mál, sum politiið arbeiðir við. Hann støkkur eisini inn á gólvið, tá hann hevur stundir, at práta um mangt og hvat.

Honum dámar væl

Jákup Alberg sigur, at hann beinanvegin var áhugaður, tá politistarnir á støðini vórðu spurdir, hvør hevði hug at vera "floksins politistur".

Tað hevur hann ikki angrað, tí á sama hátt sum hann kann læra børnini okkurt, lærir hann eisini av teimum, tí børn eru so líkatil.

Í fyrstuni var tað eitt sindur torført at kenna tey øll aftur, tí tey vóru so nógv, men so fann hann uppá at fara túr við næmingunum, nøkrum í senn. T.d. var hann ein dagin við nøkrum ein túr gjøgnum býin, og tey fylgdust oman til, Sólborg, sum lá við bryggju. Við nøkrum var hann einaferð úti á Landssjúkrahúsinum og vitjaði portørarnar, og tey sóu sjúkrabilarnar.

Tey gera ongantíð tað sama.

Kennir eisini foreldrini

Jákup hevur eisini fingið samband við foreldrini at næmingunum í 4. a. Tey komu at kennast eina ferðina, hann var við á foreldraflokki.

Hetta er eisini gott, tí tað kann altíð henda, at onkur næmingur kemur tvørt fyri, at tá er gott hjá foreldrum at hava ein slíkan mann at tosa við.

Jákup heldur, at børnini í 4. a siggja hann líka nógv sum vinmann sum politist.

- Tey rópa og heilsa uppá meg, tá tey siggja meg í býnum, og tað sama geri eg, sigur Jákup, sum nú kennir tey øll væl.

Hetta váttar Katrin Jacobsen, flokslærari hjá 4. a.

- Tey koma við stórum eygum í skúla og fortelja, at tey hava sæð Jákup.

Gott vinarlag

Katrin er fegin um samstarvið, tí upp á henda máta an læra børnini, at politi er til at hjálpa, og einki er at ivast í, at tað eisini ávirkar tey at hava so neyvt samband við ein politist.

- Hann dugir eisini so væl og kemur ikki bara í ørindum. Jákup spyr t.d., hvussu tað gongst teimum at lesa, og einaferð var hann eisini við okkum í kirkju.

- Eg haldi hetta vera eitt gott tiltak, sigur Katrin.

Ætlanin er, at Jákup Alberg Berg skal fylgja hesin flokkinum allan vegin upp gjøgnum skúlan. So hvørt sum børnini verða eldri, fáa tey óvað meira og meira at tosa saman um.

randi



Jákup Alberg Berg er fegin um, at j´úst hann slapp at vera floksins politistur



Í hølum Føroya Sparikassa legdi SSP-nevndin í gjár fram nýggja kunningartilfarið. Uni Vestureið, sum umboðar politiið í nevndini, greiddi frá SSP-nevndini og hennara arbeiði

Mynd: Kalmar

Skulu læra munin millum rangt og rætt

Skúlar og barnagarðar fáa nú føroyskt undirvísingartilfar at nýta til at læra børn og tey ungu at finna rætta stevið

Síðan 1987 hevur í Havnar kommunu sitið ein SSP-nevnd.

SSP er stytting fyri Sosialur myndugleiki, Skúli og Politi, og talan er sostatt um tvørfakligt samstarv.

Í Danmark hevur hetta samstarv virkað síðan 1975.

Samstarvið er millum sosial- og heilsumyndugleikar hjá kommunum, skúla- og frítíðarfyristingar og politiið á staðnum, og endamálið er at fyribyrgja barna- og ungdómskriminialiteti.

Viðgera mál í felag

SSP-nevndin setir ikki sjálv ítøkilig tiltøk í verk, men hon tekur upp spurningar og trupulleikar til viðgerðar.

Í SSP nevndini sita nú Beate L. Jensen fyri barnaverndina, Kristian Magnussen fyri sosialu deild, Johannes Álvheygg fyri skúlaráðið, Ása Ellefsen fyri Landsskúlafyrisitingina, Steingrím Niclasen fyri skúlastjórarnar og Uni Vestureið fyri politiið.

Higartil hevur einki føroyskt tilfar verið til teirra, sum hava við børn og ung at gera, og sum royna at ávirka hugburð og atburð hjá børnum og ungum, sleiðis at tey ikki missa stevið í uppvøkstrinum og seinni í lívinum.

Umsett úr donskum

Orka var ikki til at gera føroyskt tilfar, og SSP-nevndin valdi tí at fáa gott danskt undirvísingartilfar umsett og lagað eftir føroyskum viðurskiftum.

Hetta arbeiðið er nú liðugt, og skúlar og barnagarðar kring alt landið fáa nú tilfarið ókeypis. Politiið útflýggjar teimum tað. Onnur kunnu fáa tilfarið við at venda sær til Landsmiðstøðina fyri Undirvísingartilfar.

Fimm hefti

Tað eru fimm arbeiðshefti, ið takast kann burturúr eftir tørvi og áhuga, og tey eru ætlað børnum frá barnagarðsaldri og upp til tey ungu í framhaldsdeildini.

Theodor Hansen hevur umsett úr donskum, og hann hevur saman við Amy og Svenning Tausen lisið rættlestur. Dimmalætting hevur prentað.

Tað kostar ikki einki at fáa heftini, sum tilsamans eru slakar 300 síður, umsett og útgivin.

Landsskúlafyrisitingin læt 25.000 krónur til umsetingina, men tað mesta hevur Føroya Sparikassi goldið, góðar 150.000 krónur.

randi

LUTASEÐLAR

Vinnaratølini av lutaseðlinum til frama fyri námsferð hjá 3 z í Hoydølum vórðu:

1.	2658	11.	2513
2.	2498	12.	1986
3.	3223	13.	2863
4.	703	14.	2052
5.	1734	15.	714
6.	573	16.	2661
7.	2501	17.	3266
8.	2251	18.	2074
9.	1145	19.	2664
10.	2552	20.	1631

Av tí at vit eru burturstødd, verða vinnararnir bidnir um at ringja á tlf. 14127 ella 17799.

Eftir 16.10.95, eftir kl. 17.00. Seinasta freist hjá vinnarunum at boða frá er 31.10.95.

Takk fyri stuðulin **3 z**